TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**torshavn.fo/hoyringar**

# Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 26. oktober 2023 uppskot um at broyta ásetingarnar um minst loyvdu grundstykkjavídd til tví- og raðhús í A1 sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, kap. II, §5, stk. 3 og 11.

Ásetingar fyri minstu grundstykkjavídd í A1 økjum áðrenn broyting:

***Kap. II, § 5***
*Stk. 3. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 500 m².*

*Stk. 11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini eru minni enn 500 m², tó í minsta lagi 400 m² fyri stakhús og 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.*

Ásetingar fyri minstu grundstykkjavídd í A1 økjum eftir broyting:

***Kap. II, § 5***
*Stk. 3. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 500 m² fyri stakhús og 300 m² fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m² fyri hvørt grundstykki.*

*Stk. 11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 m², tó í minsta lagi 400 m².*

Tilfar, sum lýsir uppskotið um broyting av almennu byggisamtyktini, liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 30. oktober 2023 til 11. desember 2023.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 11. desember 2023.